út pakkarnar. Stórt jólatræ var eisini, sum dansað varð um. Føroyskir og danskir jólasálmar og jólasangir vórðu sungnir av glaðum barnarøddum og borðreitt varð, áðrenn vit fóru heim við sjokulátu og køkum. Eg hugsi næstan, at Johs mundi halda á til stutt fyri sín deyðadag fyrst í 30-unum.

## Nógvar vitjanir

Egil greiðir gjølla frá teimum vitjanum hann hevði, eftir at hann var komin heim. Tey komu eisini í ymiskum ørindum. Ein tann fyrsta var av kona Petur í Mattalág, sum vildi hava tíðindi frá dóttrini Helgu, sum hevði búð niðri, men Egil hevði ikki hitt hana í Danmark.

Somu ørindi hevði Hanne í Kina at vita, um Egil hevði sæð Hallu, sum man hava verið ein dóttir. Tað hevði hann ikki gjørt. Kanska hava tey ikki ímyndað sær, hvussu stórt Danmark var í mun til Føroyar.

Egil hevði 7. oktober vitjan av ommu Lüt og abbanum, sum Johs mátti hjálpa upp gjøgnum trappurnar, ja, hann mátti nærum bera hann.

Ein, sum ofta vitjaði, var "omma Lüt." Roknað er við, at hetta er onkur "omma" av Lützenfólkinum, sum tey hjá Faktorinum høvdu so nógv samband við. Men tað er ikki eydnast at finna nakran, sum samsvarar við hennara føðingardag 6. mai. Gitt er, at hetta kann hava verið einkjan eftir Nichels, Sigrid Maria, sum kann hava verið í Havn at vera hjá onkrum av børnunum. Um nakar veit meira um hetta, vilja vit fegin frætta.

Egil hevði sama dag eisini vitjan av Katrinu hjá Kjalnes Petur. Hetta er Katrina Christiansen, sum í síni tíð hevði handilin við sama navni í Bringsnagøtu. Her var eisini vinskapur, hóast tað var heilt fitt av aldursmuni millum tey.

Katrina Christiansen, dóttir Biritu og Kjalnes Petur, yvirtók handilin í 1927 og rak hann, til hon doyði í 1950. Síðani yvirtók sonurin, Haldor Christiansen handilin, sum hann rak til fyri fáum árum síðani.

Tað vóru fleiri ung, sum hildu saman um hesa tíðina. Á mynd í blaðnum í dag sæst Egil saman við Katrinu, Hedvig Restorff og Nancy Svendsen, sum heldur ikki fekk langt lív. Hon doyði eins og Egil í 1919, og fara vit at umrøða hana í røðini Hendur ið Sleptu. Tey standa lið um lið í kirkjugarðsprotokollini.

Í sambandi við arbeiðið við ta greinina er komið fram á eina lítið "trekk" um Katrinu.

Tann 7. Januar 1922 fekk Sigrid f. Svendsen gift við Vilhelm Nielsen



*Vinfólk í Havn áðrenn 1919. F.v. Katrina Christiansen f. Petersen, Egil, Nancy Svendsen og Hedvig Restorff.*



*Súsanna Niclassen, sum helt hús hjá Johs. Drongurin kann væl vera Egil.*

eitt hefti við nótum frá Katrinu.

Við hesi gávu var eitt visitkort, har tað var prentað Katrine Petersen, Thorshavn, Færøerne.

Hetta var so prentað, áðrenn Katrina varð gift, og tað er í sær sjálvum nokk so pussugt, at ein ung genta tá í tíðini fær sær visitkort. Men hon giftist so við Viggo Christiansen, og hevði tá við penni sett f. (fødd) frammanfyri Petersen og hevur skrivað Christiansen omanfyri.

Aftanfyri hevði Katrina so skrivað hetta fitta versið:

*Din første Fødselsdag som Moder*
*Jeg give dig vil disse Noder*
*Og ønske af Hjerte din Datter lil*
*Ofte maa høre dit søde Spil*
*Tillykke*

Tað kann vera nevnt, at Katrina var systir Wensil Petersen, sum var giftur við Sofíu, systir Sigrid.

Um kvøldið kom Poul Kjelnæs. Hann kom ofta á vitjan. Poul var systkinabarn Sofus, pápa Egil. Poul var ein vælumtóktur bakari. Tá ið hann doyði, skrivaði Georg Lindenskov Samuelsen um hann:

"Som Menneske gik Afdøde stille og fordringsløs blandt os. Hans venlige Væsen lyste stilfærdigt op i Smil, naar man mødte ham, og han mestrede med Uforlignelighed Opmuntringens Kunst, naar det krævedes blandt Vennekredsen."

Egil hevði tann 9. oktober vitjan av Joen Kjølbro og Mourits Vinther úr Klaksvík.

Kjølbro var kendur við ættina. Hann var føddur í 1887. Hann kom í Bechs handil í 1903 og hevði tískil arbeitt saman við Faktorinum í eini fimm ár. Hann var í virkinum fram til 1912. Frá 1912 til 1915 var hann fyristøðumaður fyri úthandilin á Biskupstøð, har Karen Jacobsen, sum hann giftist við, hevði verið fyristøðukvinna undan honum. Í 1915 stovnaði hann sín egna handil, sum var byrjanin til størstu fyritøku, sum hevur verið í Føroyum.

Mourits Winther var føddur í 1869. Hann var ættaður av Sandi og giftist við Sonnu, sum var dóttir Nichels Lützen. Hann kom at reka Jørgen Bech og Sønner víðari, og kom tað framvegis at vera størsta virki í Norðoyggjum upp til 1920-ini.

Tann 10. hevði Egil vitjan av Absalon presti. "Han var den samme Absalon, som han altid havde været."

## Abalonprestur vitjaði eisini

Absalon Joensen var eisini ein serligur persónur. Hann var veruliga meira kendur fyri nógv annað enn sítt prestayrki. Hann fór pílagrímsferð til Jerusalem, sum hann eisini skrivaði bók um. Annars var hann slóðbrótari innan svimjing í Føroyum. Eisini var hann slóðbrótari innan fráhaldsarbeiðið. Hann var eisini kendur fyri sínar myndatøkur. Ikki minst av fiskimonnum yviri í Íslandi, tá hann var sjómansprestur har yviri.

Absalon var eisini kendur fyri sítt hjálpsemi. Han vitjaði javnan Egil.

Tann 11. hevði Egil vitjan av Hedvig Restorff, sum var gift við Nyholm Debes. Tann 12. Fær hann vitjan av læknanum Dr. Hansen, og hann helt Egil hava ov lítið av magasýru.

Egil varð vigaður 13.10, og vigaði hann tá bert 93 pund. Hann hevði tapt seg nógv, síðan hann fór av sanatoriinum í Danmark. Tá hann kom hagar, vigaði hann kortini 100 pund.

Tann 17. kom Beskytteren frá Keypmannahavn, og Egil fekk nøkur orð frá mammubeiggjanum, sum hevði skrivað fyri mammuna, sum enn lá sjúk.

Hevði tann 18. vitjan av sínum gudsoninum Albert hjá Søreni. "Hann var ógvuliga fittur at tosa við."

Aðrir, sum vitjaðu, vóru Johan í Grótinum og "snedker Mørkøre", m.a. pápi Onnu Askham, sum gjørdist 104 ár. Tá ið nakað skuldi gerast vóru boð send eftir honum. Hetta var ikki minst, tá ið bandagan skuldi spennast.

Súsanna, mostir Onnu, helt hús hjá Josh, og tað er eisini ofta, at hon verður nevnd í dagbókini. Hon var eitt álitisfólk, og hon skipaði fyri búgnum, tá ið Josh doyði í 30-unun.

Í samrøðu, sum FF-blaðið hevði við Onnu Askham í 2003 greiddi hon frá, at beiggi Súsannu, Niclas, var kallaður petroleumskongurin, tí hann seldi petroleum og olju í Føroya fyrstu oljuhavn á Langasandi í Kollafirði.

Hann var ein tann fyrsti føroyingur, sum hevur verið uppi á Rockall. Hetta var í 1886 við Delfinuni.

Annars fekst Egil framvegis nógv við telva við tey, sum komu inn á gólvið.

Ein, sum ofta kom inn á gólvið, var Jacob Kjelnæs, sum var komin aftur til Havnar eftir at hava arbeitt hjá T.F. Thomsen í 43 ár, har hann varð roknaður at vera ein framúr alitismaður.

## 15. November

### Vánaligur ársdagur

I Dag er det lige et Aar siden, jeg rejste til Kjøbenhavn i Haab om at blive helt rask, men hvem der endnu er meget sløj og er nødt til at ligge paa Ryggen i Sengen, det er mig. "Tað er alt annað enn stuttligt".

Regnen den styrtede ned hele Dagen igennem. Befandt mig nogenlunde. Ved kl. 6 Tiden hjalp Johs mig med at klæde mig lidt paa. Siden var jeg nede i Stuen et par Timers Tid. Spillede et parti Skak med Johs, som han selvfølgelig vant.

Prøvede at spise Aftensmaden, men kastede den op igen. Dog havde jeg kun 37,3 i Feber, da jeg kom i Seng igen. Lagde mig til Ro kl. 9.

**Komandi partur**

Komandi partur í hesi røð kemur um tvær vikur. Tá fara vit framhaldandi at frætta um gongdina hjá Egili, og hon er sum tað skilst ikki nakað serlig.

Í Ólavsøkublaðnum er annars ein Miðvikulíknandi grein um næstringar hjá William Heinesen og Jørgens Frants Jacobsen, sum ikki eru grivnir í kirkjugarðinum á Svínaryggi.